Fíggjarlógin løgd fram fríggjadagin

Landsst‡risma›urin í fíggjarmálum fer fríggjadagin at leggja fíggjarlógina fyri 2001 fram fyri almenningin

JOHN JOHANNESSEN

Fríggjadagin ver›ur fíggjarlógin fyri 2001 løgd fyri løgtingi›.

Í sama sambandi› ver›ur eisini tí›indafundur í Nor›urlandahúsinum, har Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum leggur fíggarlógina fram fyri almenninginum.

Eitt sinur størri

Tølini í fíggjarlógaruppskotinum fyri ár 2001 eru ikki almenn enn. Men ta› er tó greitt, at skotin ver›ur upp ein fíggjarætlan, sum er eitt sindur hægri enn fíggjarlógin fyri í ár.

Millum málsøkini, sum næsta ár fáa hægri játtan eru almanna- og heilsumál og skúla- og mentanarmál.

Játtanin til Almanna- og Heilsumál var› hækka› munandi eftir at Helena Dam á Neystabø, landsst‡risma›ur, i› umsitur málsøki›, hótti vi› at fara úr sessinum, fekk hon ikki hægri játtan.

Helena Dam á Neystabø metti nevniliga ikki, at hon kundi umsita málsøki› á forsvarligan hátt, fekk hon ikki hægri játtan.

Orsøkin til, at játtanin til mentanar- og skúlamál er hækka›, er millum anna› hækka›u læraralønirnar.

Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum, vil ikki siga, hvussu høg fíggarlógin fyri 2001 er. Men hann váttar millum anna›, at fíggjarlógaruppskoti› hesafer› er gjørt solei›is, at ney›ugt ver›ur ikki vi› eins nógvum eykajáttanum, sum í ár.

Til vi›ger›ar um gó›a viku

Fíggjarlógaruppskoti› er rættuliga umfevnandi. Tí er ney›ugt, at tingfólk fáa gó›a tí› at lesa ta› ígjøgnum, á›renn fyrstu vi›ger›, heldur Finnbogi Ísakson, løgtingsforma›ur.

Tískil ver›ur fyrsta vi›ger› av fíggarlógaruppskotinum ikki fyrr enn í minsta lagi ein vika er li›in frá at uppskoti› var› lagt fram.

Tí kann ikki hugsast, at uppskoti› kemur til vi›ger›ar í tinginum fyrr enn í fyrsta lagi t‡sdagin 10. oktober.

Vanligt er, at vi›ger›in av fíggjarlógaruppskotinum tekur drúgva tí›, og sjáldan ver›ur ta› samtykt fyrr enn beint á›renn jól.

Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum, vónar, at ta› fer at eydnast at fáa skjótt, men gjølla vi›gjørt, solei›is at ta› ver›ur samtykt í gó›ari tí›.



Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum, fer fríggjadagin at almannakunngera fíggjarlógaruppskoti› fyri 2001

Drigið verður millum seld atgongumerki og vinnarin verður funnin í høllini. Høvuðsvinningurin er ein ferð til Sveits við 12. manni til landsdyst millum Sveits-Føroyar.

MARKO´2000
SØLUSTEVNAN

Verður í ítróttarhøllini í Runavík 29. sept - 01. okt.
Opið er fríggjadag kl. 17-22 • leygardag kl. 14-22
sunnudag kl. 15-22

Luttakarar:

Skósølan Gøtugjógv, P/F Jógvan Weihe, Curri, Flísan, Sp/f Sirri, MB Tours, Sp/f Inventartænastan, Profa, Benetton, Hon & Hann, Klæmint Petersen, Tutl, Millenium, Máling og Gólv, Shop Inn, Brøður Petersen, Húðrøkt v/Jørnu, Feðgar, ABS Transport, AD-Import, Súkkluhandilin í Líðini, Esmar Simonsen, JH Møblar, Com-Data, AWI Boats, Barnaútgerð, OilWind, Sp/f Hógv, Frú S

Undirhald

Eivør Pálsdóttir, Sámal Ravnsfjall, Niels Midjord, Vísumenn úr Klaksvík, Rúna á Heygum, Ronnie Nielsen, Magni Christiansen

Magni Poulsen er frásøgumaður í samband við mótasýningarnar

SANSIR · TEL 355355

Marko Skrivstovan, Post Boks 173, FO-620 Runavík, Føroyar
http://www.geocities.com/marko2000fo/
Tel 22 22 50, Tel 22 22 51 Fax +298 44 95 35, e-mail: rogvi-la@post.olivant.fo

Nor›urlendsku umbo›smenninir vitja í Føroyum

Umbo›smenninir frá parlamentunum í Danmark, Noreg og Íslandi eru komnir til Føroya at halda fund

JOHN JOHANNESSEN

Í gjár komu umbo›smenninir fyri tingini í Danmark, Noreg og Íslandi til Føroya. Teir hittast vanliga einafer› um ári› at halda fund saman, og hesafer› ver›ur fundurin í Føroyum.

Fundin hildu teir á Hotel Hafnia í gjárkvøldi›, og restina av tí›ini, til teir fara avsta› aftur sunnudagin, skulu teir hitta løgtingi› og a›rar stovnar og nevndir í Føroyum.

Fund vi› løgtigi›

Í dag, hósdagin, klokkan hálvgum ellivu skulu nor›urlendsku umbo›smenninir á fund vi› løgtingi›, sum arbei›ir vi› at fáa umbo›smannaembæti› hjá løgtinginum sett á stovn.

Seinnapartin skulu umbo›smenninir eisini vitja ríkisumbo›smannin, á›renn teir fara at hyggja seg um í Havn og á konsert í Vesturkirkjuni.

Fríggjadagin skulu umbo›smenninir á fund vi› grundlógarnevndina, somulei›is sum teir eisini skulu hitta a›astjórarnar fyri øll st‡rini í umsitingini og umbo› fyri kommunurnar.

Seinni skulu hendan dagin skulu umbo›smenninir aftur hitt løgtingi›, hesafer› til døgur›a.

Leygardagin skulu umbo›smenninir útfer› vi› bátinum, Thorshavn, hjá ríkisumbo›num, og seini skulu teir eta døgur›a saman vi› løgmanni.

Føroyskiumbo›sma›urin nærkast

Seinasta fríggjadag hev›i løgtingi› fund um, hvussu farast skal fram, tá føroyski umbo›sma›ur tingsins ver›ur settur.

Jenis av Rana, sum er forma›ur í nevndini, i› er sett at vi›gera eina føroyska umbo›smannaskipan, sigur seg hava fingi› áheitan frá einum persóni, i› bæ›i er áhuga›ur og egna›ur at gerast løgtingsins umbo›sma›ur.

Men enn er ikki greitt, hvussu farst skal fram, tá løgtingsins umbo›sma›ur ver›ur settur. Mannagongdin í ør›um londum er, at tingi› finnur fram til tann best egna›a. Talan er ikki um eitt starv, i› ver›ur l‡st leyst. Nøkulunda á sama hátt hugsar Jenis av Rana sær, at ta› ver›ur í Føroyum.

Uppgávan hjá einum løgtigsins umbo›smanni ver›ur millum anna› at hava aktivt eftirlit vi› politisku skipanini. Hann kann leggja uppí og gera vart vi› gjørd mistøk. Men hann kann ikki broyta eina avger›. Í sta›in kann hann siga sína hugsan um mál og koma vi› einum tilmæli til vi›komandi myndugleika.

Løgtingsins umbo›sma›ur skal í veruleikanum vera borgarans ambo› mótvegis politisku skipanini.

Fáa lærdóm ígjøgnum luftina

Fjarundirvísing ígjøgnum alnetið ger, at tað nú ber til at at lata studentar í Íslandi og studentar í Føroyum fylgja tí sama skeiðnum



Alnetið gevur heilt aðrar møguleikar, enn vit higartil hava vitað um. Ikki minst innan undirvísing og gransking. Nú eru føroyingar og íslendingar farnir í samstarv um útbúgvingina til ravmagnsverkfrøðing og ein stórur partur av undirvísingini fer fram um alnetið. Her eru Magnus Danielsen, v.m. og Egill Hreinsson úr Íslandi, professarar í ravmagnsverkfrøði staddir á Náttúruvísindadeildini.

Mynd.J.Kr. Vang

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað er ein sannroynd at tann nýggi teknikkurin gevur okkum heilt nýggjar møguleikar á nógvum økjum.

Men teknikkurin nyttar onki, uttan so, at hann verður brúktur.

Eisini innan útbúgving og gransking kann alnetið fáa ómetaligan týdning.

Hetta hevur Fróðskaparsetrið ásannað og tað er longu farið undir eitt forvitnisligt tiltak, sum ber í sær, at tað ber til hjá studentum í Føroyum og studentum í Íslandi at fylgja við í sama skeiði.

Tað er Náttúruvísindaliga deildin á Fróðskaparsetrinum, sum er farið í samstarv við Háskóla Íslands um útbúgvingina til ravmagnsverkfrøðing.

Hetta samstarvið ber í sær, at tað ber til hjá teimum, sum lesa til ravmagnsverkfrøði í Føroyum, og teimum, sum lesa til ravmagnsverkfrøði í Íslandi at fylgja við í teimum somu skeiðunum.

Á Náttúruvísindadeildini í Havn ber til at lesa til verkfrøði í olju og í ravmagni.

Fyribils er tað eitt skeið um elorkuskipanir, sum Fróðskaparsetrið og Háskóli Íslands nú eru felags um.

Magnus Danielsen, professari í elverkfrøði á Náttúruvísindaligu deildini í Havn, sum stendur fyri útbúgvingini til ravmagnsverkfrøðing, sigur, at hetta er eitt dømi um, at tað ber væl til at brúka felags lærarar til ymsar útbúgvingar, hóast undirvísingin annars er í hvør sínum landi.

Hann sigur eisini, at tað er neyðugt hjá Fróðskaparsetrinum at brúka gestalærarar uttan ífrá, tí lærarar eru ikki á setrinum til ymsar serlærugreinar.

Og í sambandi við skeiðið um elorkuskipanir er tað altso Egill Hreinsson, professari á Háskóla Íslands, sum eisini undirvísir studentunum í Føroyum.

Ein stórur partur av hesi undirvísingini fer fram um alnetið, har studentarnir í Føroyum kunnu taka fyrilestrar, tekningar o.a. tilfar frá honum, niður av netinum.

Annars er hann eisini í Føroyum av og á og heldur fyrilestur.

Men samstarvið gongur eisini hinvegin, tí samstundis er tað Benadikt Joensen, verkfrøðingur í Føroyum, sum stendur fyri uppgávurokningum og laboratoriuvenjingunum, til hetta saman skeiðið, bæði hjá studentunum í Føroyum og í Íslandi.

Eisini tað fer fram um alnetið.

Magnus Danielsen sigur, at hetta er eitt skeið, sum eisini hevur áhuga fyri verkfrøðingar.

Á hesum skeiðinum hava verkfrøðingar hjá SEV verið við.

Hann sigur, at seinni er tað ætlanin at skipa undirvísinginina um alnetið sum ljóðundirvísing.

– Hetta er ein undirvísingarháttur, sum mennist alla tíðina og málið er at skipa tað soleiðis, at tað ber til hjá studentunum bæði í Føroyum og í Íslandi at fylgja beinleiðis við í fyrilestrum og undirvísingini.

Magnus Danielsen sigur, at so hvørt teir fáa fleiri royndir á hesum øki, fer hesin undirvísingarháttur uttan iva eisini at verða brúktur í øðrum útbúgvingum á Fróðskaparsetrinum.

Kundi tú hugsa tær eina Odda-klokku?

Øll børn, sum koma í Suðuroyar Sparikassa og stovna eina Odda-konto og seta pening inn, fáa sjálvandi ein Odda.

Harumframt fáa tey eisini eina avbera fitta Odda-klokku, sum er ein vekjara-klokka.

Tey sum longu hava konto, fáa sjálvandi eina Odda-klokku, tá tey koma í Sparikassan við sparipeninginum.

SUÐUROYAR SPARIKASSI

Postboks 2 · FO-900 Vágur / FO-950 Porkeri / Postboks 374 · FO-110 Tórshavn